TVØROYRAR KOMMUNA

# Stuðul til Sosialu Deild á Tvøroyrar Kommunu

Sosiala deild á Tvøroyri søkir eftir fólki at byrja so skjótt sum til ber. Talan er um eitt stuðulsarbeiði hjá einum barni við serligum tørvi. Barnið hevur eina sjuku, sum hevur við sær ymiskar trupulleikar fyri barnið, sum tískil má fáa hjálp í dagansingini og í heiminum.

Arbeiðið er eitt fulltíðarstarv, har ein arbeiðir hálva tíð í dagrøktini og hálva tíð í heiminum hjá barninum.

Stuðulin skal vera við til at gera gerandisdagin hjá barninum so góðan sum tilber, so barnið kann mennast á ein fullgóðan hátt. Arbeiðið verður skipað í samráð við Dagrøktina á Tvøroyri og Sosialu Deild við møguleika fyri regluligari ráð- og vegleiðing.

Stuðlin arbeiðir tætt saman við familjuni og dagrøktini, umframt øðrum fakbólkum t.d. fysioterapeutum og stuðulstoymi á Tvøroyri fyri børn við serligum tørvi. Tað er tískil týdningarmikið at stuðulin dugir at tillaga seg, samstarva, er opin, positivur og hevur tol. Tú mást duga at síggja møgulleikar fram um mørk, so barnið fær avbjóðingar í degnum.

Ynskiligt er at tey, ið sett verða, hava hóskandi fakliga útbúgving og royndir innan mennandi arbeiði við børnum t.d. námsfrøðingur, lærari, ergoterapeutur, e.l. Men fólk við aðari viðkomandi útbúgving ella royndum eru eisini vælkomin at søkja.

Arbeiðið hevur við sær nokk so fitt av koyring. Tann, ið settur verður, má tískil hava bil og koyrikort.

Lønar- og seturnarviðurskifti sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi hin 15.10.08 og skulu stílast til:

Tvøroyar Kommuna
Sosiala Deild
Tvøráv. 37
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri
Att; Susanne Madsen

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf.: 371085 hjá Susanne Madsen allar gerandisdagar kl.10.00-16.00 ella Súsannu Poulsen á tlf. 211339.

# Meginreglur fyri sølutorgið í Vágsbotni

Loyvt er at selja:

- Nýveiddan fisk
- Nýveidda grind
- Nýveiddan fugl og egg
- Óskorið grønmeti og epli
- Fiskavøru frá góðkendum og løggildum virkjum

Sí treytirnar fyri sølu á torshavn.fo

Tórshavnar kommuna

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Sjúkrarøktarfrøðilesandi

**Nýggjur flokkur byrjar 2. februar 2009**

**Útbúgving og møguleikar**
Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði – Bachelor of Science (BSc) in Nursing.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú veruliga upplivir, at tú kanst gera mun.

Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar bæði her á landi og uttanlands.

**Hølis- og lestrarumstøður**
Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin húsast í nútímans hølum miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, sum ganga á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum og væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú ein partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**
Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er: anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**
Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. november 2008 og sendast til

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

Í viku 42 (13. -17. oktober), verður telefonin bert tikin frá kl. 13.00 til 16.00.

**Føroya Arbeiðarafelag**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# & Myndaviðgerð fotoarbeiði

Dámar tær væl at arbeiða við teldu og at brúka tíni kreativu evni, samstundis sum tær dámar at vera mitt í rokanum, ert tú kanska júst tann, vit leita eftir.

Vit skulu brúka eitt fólk, sum nakrar tímar um vikuna ella hálva tíð – onkuntíð við eitt sindur "skeivum arbeiðstíðum" – kann arbeiða við myndaviðgerð og øðrum fyrifallandi arbeiði í okkara fotoatelieri.

Hetta er eitt spennandi starv og arbeiðspláss, har eingin dagur er eins og nýggjar avbjóðingar alla tíðina eru á skránni. Møguleiki er fyri, at starvið verður víðkað til fleiri tímar ella fulla tíð.

Send okkum nakrar reglur um teg sjálva/n og orða eina einfalda umsókn, so venda vit aftur fyri at finna útav, um hetta er nakað fyri bæði teg og okkum.

Hevur tú onkrar spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á telefon 31 71 11, men helst vilja vit frætta skrivliga frá tær. Stíla brævið til:

**FOTOSTUDIO**
v/Per á Hædd og Finnur Justinussen
Sundsvegur 8 · Postboks 1308 · 110 Tórshavn

# KUNNGERÐ

**um valevnislistar til kommunuvalið í Vestmanna Kommunu 11. november 2008**

Í Vestmanna Kommunu kann ein valevnislisti hava til og við 11 valevni. Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal vera ein serligur listi yvir stillararnar, hvar teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Ein persónur kann bert vera stillari á einum lista.

Listin skal latast inn av einum stillara til kommununa ella Heðin Winther Olsen, valnevndarformann, í seinasta lagi týsdagin 21. oktober 2008 kl. 18.00.

Vestmanna, 8. oktober 2008

**Kommunuvalnevndin**

Heðin Winther Olsen, formaður
tlf. 274337